# Áhugaverd listaframsýning á Torginum í SMS

**Listafólkini starvast dagliga á verkstøðunum Vón á Argjum, á Brekku í Klaskvík og á Stýggjum í Runavík, umframt á danska skúlanum, Voksenskolen Lysbro**

LIST
*Tíðindaskriv*



Leygardagin 25. mai kom eitt ferðalag við fjúrtan fólkum úr Danmørk til Føroya at hava skeið fyri listafólkum, sum arbeiða á vardu verkstøðunum Vón á Argjum, á Brekku í Klaksvík og á Stýggjum í Runavík. Danska ferðalagið kemur úr skúlanum, Voksenskolen Lysbro, sum liggur í Silkeborg. Fýra av teimum fjúrtan í ferðalagnum eru lærarar, meðan hini tíggju eru næmingar.

Skipað er fyri skeiðnum til tess at varpa ljós á listina hjá teimum menningartarnaðu, og samstundis læra tey nýggjar hættir innan listina. Umframt tey fjúrtan úr Danmørk, eru átta luttakarar úr Føroyum, sum allir eru knýttir at teimum trimum omanfyri nevndu verkstøðunum. Í sambandi við skeiðið er myndaframsýning á Torginum í SMS. Sýnd verða fram verk, sum luttakararnir á skeiðnum hava evnað til. Á framsýningini vera umleið 30 myndir. Her heima eru tað Javni og Verkstaðið Vón, sum hava lagt tiltakið til rættis. Framsýningin á Torginum lat upp mánadagin 27. og er opin til og við mikudagin 30. mei.

# Alternativ »Tey grønu í Føroyum«!

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Tað finst bert eitt alternativ til teir etableraðu politisku flokkar og eru tað »Tey grønu í Føroyum«, sum ein alment var frammi við fyri einum 15 árum síðan.

Tað, at ein kunnaði um grønu stevnu- og virkisskránna í føroysku bløðunum, førdi við sær, eina størri tilvitan um náttúru- og umhvørvisvernd í síni heild.

Tað, okkum tørvar, er at fáa samskipa alla náttúru- og umhvørvisvernd, sum vit skulu fáa út í fólkaskúlar, síðan framhaldsdeildir, hægri skúlar og lærustovnar. Tað er neyðugt at fáa skipa eina grøna grasrótarrørslu og grønan felagsskap og flokkin »Tey grønu í Føroyum« ein alment hevur verið frammi við.

Tað er slíkt, ið ikki byggir á politiskar floksideologiir/ismur hjá politisku flokkunum, ið stýrdir verða av stórkapitalistisku kreftunum, ein áður hevur umrøtt.

Eg kann siga, at »Tey grønu í Føroyum« hava hesi meira enn 15 árini havt ávirkan á almenningin, myndugleikar, vøldir, felagsskapir og politikk-arar. Tað sama kann sigast, tá náttúru- og umhvørvis ráðstevnur vórðu skipaðar í áttati og níti árunum og nú í 2002 og hvørs ein bert var til tað seinastu.

Eg eri sostatt tann einasti í Føroyum, ið havi ætlanir at taka slíkt upp aftur og tað nýggju slóðbrótandi alt umfatandi orkusparandi tøknina v.m.

Eg havi á orku- og umhvørvisráðstevnu uppi í Norðurlandahúsinum fingið størri innlit/forstáilsi/tilvitan, ið ein kann nýta í tí slóðbrótandi arbeiðinum.

Eg havi nógv at stríðast ímóti øllum etableraðum ídnaðarfyritøkum, ið skapa okkum dálkingartrupulleikar, ið hava skaðilig árin á fólkaheilsu.

Og eg havi funnið mítt støði í slíkum samanhangi og staðfest mín rættleika í øllum arvastríði.

# Hanus og Janus hava tveir grannagarðar…

**Símun A. Klein**

Hanus og Janus hava tveir grannagarðar, og teir velta báðir epli, sum teir brúka sjálvir og selja burturav fyri at fáa tær inntøkur, sum skulu til fyri at keypa tað, sum neyðugt er at fáa fatur á. Einasti munur millum teirra er, at Hanus hevur ein væl størri garð enn Janus.

So hendir tað, at Hanus fer at girnast garðin hjá Janusi. Hann vil hava hann lagdan afturat sínum egna, men hvussu skal hann bera seg at???

Jú, hann finnur uppá hyggjuráðini. Næsta heyst bjóðar hann Janusi epli. Hann bjóðar honum meiri enn tíggjundaparti av tí, sum Janus sjálvur hevur tikið upp. Janus er so góðtrúgvin, at hann heldur hettar verða eitt sera gott tilboð, og hann heldur, at nú er hann ríkur. Ja, hann heldur seg vera so væl fyri, at hann næsta ár kann sleppa frá at seta niður líka nógv epli, sum hann plagar, og hóast tað kann hann fáa alt tað, ið honum lystir.

Hettar gongur gott í fleiri ár, og janus sleppur frá at arbeiða so nógv sum fyrr, tí Hanus er so beinasamur at hjálpa honum.

Men so hendir tað, sum Hanus hevur bíðað eftir so leingi. Einhvør sjúka kemur í eplini hjá Janusi, og hann er knappligani í svárari neyð. Tá fer Janus til sín gamla vin Hanus og spyr, um hann ikki kann fáa hjálp, og Hanus er beinasamur sum altíð. Tað er gaman í sigur Hanus, hjálp skal tú fáa, bert eg fái garðin tín, og so skal tú afturfyri fáa tað gott sum húskallur hjá mær!

Nú hevur Janus einki annað í at velja, og prísurin fyri góða lív hansara í nøkur ár er tí tann, at tað ikki longur eru tveir garðar, men bert tann eini.

Tann, ið lesur hettar, hann fati týdningin av hesum!

**P.S.:** Upphavsmaður til hetta líknilsi er: Zakarias Wang!

# Temadagur um virkisportalar

**TÍÐINDASKRIV**
*Zenit*

Zenit skipar fyri temadegi um Virkisportalar, t.e. internetportalar til umsiting, kunning og samskifti innanhýsis og uttanhýsis á virkinum

Zenit skipar fyri temadegi um Virkisportalar, t.e. internetportalar til umsiting, kunning og samskifti innanhýsis og uttanhýsis á virkinum.

Temadagurin verður hildin 31. mai kl. 8.30 til 16.30 á Hotel Føroyum.

Temadagurin er skipaður í fýra høvuðspartar:

Alment um Virkisportalar og intranet

Danin Mads Richard Møller heldur fyrilestur og vísir á casir við støði í nýggju bók síni »Behind the Firewall - Danske erfaringer med INTRANET OG VIRKSOMHEDSPORTALER«.

Bókin viðgerð sera áhugavert ymsu strategisku og praktisku spurningarnar, sum eru, tá ein væleydnaður og skipaður virkisportalur skal setast í verk.

Eitt av stóru nøvnunum innan internetið, Jakob Nielsen, sigur soleiðis um bókina:

»En værdifuld og sjælden lejlighed til at få døren åbnet og se hvordan førende virksomheder designer og optimerer deres intranet. De fleste større organisationer kan spare et par millioner kroner om året i medarbejder-produktivitet ved at følge rådene i denne bog.«

**Føroyskir virkisportalar**
Praktisk dømi um virkisportalar í Føroyum. Hoyr um royndirnar og ætlanirnar hjá Dimmalætting, Havsbrún, Strandfaraskip Landsins og Føroya Gjaldstovu við teirra virkisportalum.

**Brúkarin og virkisportalar**
Hvussu nýta virki internetið, tá ið tey samskifta við brúkaran. Birgir Kruse hugleiðir um ymsar hættir og ynski, tá ið samskift verður við brúkaran. Víst verður á nøkur dømi, heppin sum óheppin.

**Føroysk skipan til virkisportalar**
Síggj, hvussu i2.netskipanin hjá Zenit kann nýtast til umsiting, kunning og samskifti á internetinum.



# Skúlastríðið í Skopun: Ingun hevur gjørt eitt stórt arbeiði

**– Tað vóru ikki øll foreldur, sum vórðu biðin um at skriva undir mótmæli ímóti fyrstalæraranum, sigur Harry Hentze í Skopun**

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*



Skopun: Tað eru verri enn so øll í Skopun, sum taka undir við atfinningunum ímóti fyrstalæraranum í bygdini.

Harry Hentze eigur sjálvur børn í skúlanum í Skopun og hann er alt annað enn samdur við teimum, sum nú hava savnað inn undirskriftir fyri at fáa fyrstalæraran í Skopun, Ingun Simonsen, úr starvi.

Tað var um vikuskiftið, at foreldur í Skopun handaði Mentamálastýrinum ein lista við undirskriftum og kravi um at skúlin fær nýggjan fyrstalærara.

Men Harry Hentze sigur, at tað vóru ikki øll foreldur, sum vórðu spurd um tey vildu skriva undir mótmæli ímóti læraranum.

– Sjálvur var eg ikki spurdur, hóast eg eigi børn í skúlanum og og veit eisini um fleiri onnur foreldur, sum heldur ikki vórðu spurd, sigur hann.

Hann sigur, at tað vóru nevniliga fleiri hús, sum vórðu lopin um, tá ið tey gingu við listanum.

– Tey, sum gingu við listanum hava ikki gjørt mætari enn at leypa tey um, har tey vitstu at fólkð ikki fór at skriva undir, sigur Harry Hentze.

Og hesa mannagongdina átalar hann harðliga.

– Tað er undir lágmark at savna inn undirskriftir ímóti einum fólki, men at leypa tey um, har tey frammanundan vita, at tey ikki fáa undirtøku. Soleiðis bera ein seg ikki at, sigur hann.

## Eitt megnararbeiði

Umframt tey, sum ikki eru biðin um at skriva undir, veit Harry Hentze eisini um onnur, sum vórðu biðin, men sum ikki vildu skriva undir.

– Langt frá øll taka undir við mótmælunum ímóti fyrstalæraranum, tí tað er ein rættiliga stórur partur av foreldrunum, sum eru stak væl nøgd við Ingun Simonsen.

– Hon hevur nevniliga gjørt eitt megnararbeiði fyri skúlan, tí hon hevur lyft hann upp á eitt heilt annað støði, enn hann var á frammanundan. Tað var onki í skúlanum, tá ið hon kom, men nú eru teldur á hvørjum horni, umframt at nógv annað er gjørt. Nú er skúlin nógv betri skipaður, enn hann var og verður rikin á professionellum støði. Í dag hava vit ein góðan skúla í Skopun, leggur hann afturat.

Men Harry Hentze heldur eisini, at tað er onki at finnast at samstarvsevnunum hjá fyrstalæraranum.

– Men tað er bara veruleikin, at tá ið ein leiðari kemur við nýggjum hugskotum og ætlar at broyta tað gamla, fær hann mótstøðu. Soleiðis er allastaðni og soleiðis er eisini í skúlanum í Skopun, men her hava broytingarnar avgjørt verið til tað betra, sigur skopuningurin.

– Og eg finni meg ikki í, at slíkt verður gjørt ímóti einum lærara, sum hevur gjørt so nógv fyri skúlan, sum hon hevur, sigur Harry Hentze.



*Ikki øll foreldur í Skopun taka undir við atfinningunum ímóti fyrstalæraranum, tí tey siga, at hon hevur verið ein fongur fyri skúlan. Savnsmynd.*